LANDSVERK

SKRIV UM EYKAJÁTTAN - REYNSTÚN

SAMBÝLIÐ TIL FÓLK VIÐ MENNINGARTARNI OG FJØLBREKI

Verkætlan nr.: 5415 **Dagfesting:** 29-11-2023

Skriv í samband við bygging av Sambýlið til fólk við menningartarni og fjølbreki

Vísandi til status fund við AMMR tann 10. november 2023 har Landsverk boðaði frá at ábendingar vóru um, at tørvur fór at verða á eini minni eykajáttan serliga til príshækkingar (indeksregulering) og til at hava nakað eyka av tiltakspeningi.

Serliga høgar príshækkingar hava verið undir byggitíðin hetta hevur við sær ein meirkostnað til indeksregulering á áleið 800.000 kr.

Byggitíðin er longd orsaka av serliga ringum veðri á vetri 2022 og vegna nakrar projektbroytingar og tillagingar, ið hava verið neyðugar. Tískil eru eyka útreiðslur til longt byggipláss, hetta hevur við sær ein meirkostnað á áleið 790.000 kr.

Hagartil eru brúktar 73 % av upphæddini sum var sett av tiltakspening. Landsverk metur at tørvur er á 400.000 kr. til eyka tiltakspening fyri at tryggja at byggingin kemur á mál, hetta er serliga vegna longda byggitíð.

Neyðugt er við hægri játtan til:

Indeksregulering (eyka)	kr. 800.000
Longda byggitíð	kr. 790.000
Eyka tiltakspening	kr. 400.000
Tilsamans	**kr. 1.990.000**

Tað er átrokandi at fáa eina eyka játtan fyri at fáa bygningin lidnan. Tó er møgulig at halda arbeiði í gongd við verandi játtan til hálvan januar 2024.

Sum møguliga fígging vil LV vísa á møguleika í játtanini 157080 Sambýlið á Mýruni, ið væl rúmar slíkari umraðfesting.

Vinarliga

Heini Eliasson Egholm
Verkætlanarleiðari

LANDSVERK